átrúnaður

Lagt til rættis: Snorri Brend *snorri@sosialurin.fo*



orðið



*Hesa vikuna:*

**John S. Myllhamar**

**Tit eru salt jarðarinnar ... tit eru ljós heimsins**
**Matteus evangeliið 5, 13-14**

Salt er eitt konserveringsevni, og ljós rekur myrkrið burtur. Soleiðis hava kristin menniskju ábyrgd á kærleiksfullan hátt at tala at dárskapinum og óndskapinum í heiminum. Sum kristin eiga vit ikki at venda okkum hin vegin og látast sum um tað illa ikki er til, men sjálv fara inn í stríðið.

Ein amerikanskur prestur sigur frá, at hann ein dagin stóð og eygleiddi nøkur ungfólk, sum skemtaðu og stuttleikaðu sær á einum gøtuhorni. Men at enda sá hann, at tey fóru ov vítt. Hann tók seg saman og fór til teirra og segði vinarliga: "Nú eru tit farin ov langt! Slíkt sømir seg ikki slíkum vøkrum ungdómi". Síðani vendi hann sær móti eini gentu og segði: "Tú mást ikki lata dreingirnar fara soleiðis við tær, teir taka frá tær tað virðið, ið tú hevur sum kvinna!"

Í nógv ár hevur okkara samfelag víst á tað „tolsemi", ið hevur kostað onnur virði. Tolsemi sigur at tað finnist einki absolutt moralskt, ið vit mugu innrætta okkum eftir, at mín uppfatan er eins góð og tín, og mong vaksin høvdu ivaleyst funnist harðliga at, um tey sóu og hoyrdu áðurnevnda prestin.

Alt hetta tolsemi hevur tíverri skapa eina mentan, ið ikki dugir at skilja millum, hvat er rætt og hvat er skeivt. Og vit sita og hyggja at meðan okkara mentan fer fyri bakka. Amen!

# Carter vil savna allar baptistarnar

**Fyrrverandi amerikanski forsetin, Jimmy Carter kallaði fyrr í mánaðinum inn til ráðstevnu, hvørs arbeiði frameftir verður at finna eitt felags stev fyri teir umleið 20 milliónir baptistarnar í USA.**



*- Neyðugt at vit sum baptistar draga eina línu, sigur fyrrverandi amerikanski forsetin, Jimmy Carter sum her heldur røðu á ráðstevnuni*

**USA:** Við á ráðstevnuni í Atlanta vóru í alt 15.000 baptistar úr øllum USA møttir.

- Eg havi sæð nógv oyðileggjandi og óynskt hjáárin í kristna heiminum, tí so nógv av okkum liggja í almennum stríði við aðrar bólkar um ymisk evni.

- Hetta var nakað av tí, sum Paulus og Pætur í "teirri fyrstu kirkjuni" máttu fáa skil á – og tað arbeiðið heldur fram í dag, segði Carter í eini samrøðu við Atlantablaðið Constitution.

83 ára gamli Jimmy Carter varð valdur til forseta fyri Demokratiska flokkin í 1977 og sat eitt skeið, fram til 1981.

### Innanhýsis ósemja

Ráðstevnan, har ein ynskti at skapa eina nýggja eind og allíansu, varð av fleiri fjølmiðlum skýrd sum slóðbrótandi, skrivar danska vikublaðið Udfordringen.

Ætlanin er nú at fara undir eitt størri samstarv um sosialar trupulleikar, sum til dømis stríðið móti fátækradømi og at eggja fólki at fara út í missiónsarbeiði.

Júst á missiónsøkinum metir fyrrverandi amerikanski forsetin, at baptistarnir við teirra innanhýsis stríði hava svikið.

- Eg haldi, at spjaðingin er tað mest oyðandi og ólagaliga elementið, og sum aftur hevur gjørt effektivitetin til missiónsarbeiði munandi veikari í kirkjuni, slær hann fast.

Tað eru kortini ikki allar baptistrørslurnar í USA, sum eru eins fegnar um nýggja framtakið. Leiðarar í Southern Baptist Convention, sum er størsta protestantiska kirkjusamfelagið í USA, valdu ikki at senda umboð á ráðstevnuna.

Sambært The Christian Post verður funnist at tiltakinum, tí mett verður at politiskar undirtónar liggja sum grund fyri tí, eins og nevnt verður samanfallið við undanvalini til forsetaembætið og virknu luttøkuna hjá Bill Clinton og Al Gore á ráðstevnuni.

## Ein góð byrjan

Hóast ósemjuna, var líkt til at teir 15.000 luttakararnir høvdu fingið væl burtur úr og gleddu seg til næsta stig á leiðini.

- Henda ráðstevnan var góð, men hon kundi verðið enn betri. Hinvegin, er hetta í øllum førum ein byrjan, sigur ein av luttakarunum, hin 33 ára gamla Laura Cadena við tíðarritið "The Baptist Standard".

Hon hevur lisið gudfrøði og er limur í eini baptistakirkju í Atlanta, og ynskti sær, at ein næstu ferð bjóðar fleiri kvinnum, meiri ungdómi og fleiri baptistum úr øðrum heimspørtum við.

- Men hetta var í øllum førum ein góð byrjan, slær Cadena fast.

# Bíbliunnar kvinnur vóru ikki kúgaðar kókikonur

**Kvinnudagin 8. mars verður skipað fyri einum tiltaki í Kelduni undir heitinum: „Kann nútímans kvinnan læra nakað av Bíbliunnar kvinnum?". Tiltakið er fyri kvinnur í øllum aldri.**

**Í Skálafirði:** - Nógv av tí, sum verður tosað og skrivað um í almenna rúminum um kristindóm og kvinnur eru gitingar, sum einki hava við veruleikan at gera, vísa fyrireikararnir av hesum tiltakinum á.

Í Bíbliuni finnast nevniliga nógvar søgur um megnar kvinnur, sum ikki smæddust burtur, men óttaleysar livdu eftir sínari sannføring.

- Nei, kvinnur í Bíbliuni vóru ikki nakrar undirkúgaðar kókikonur, og vit hava sanniliga nógv at læra av teimum, siga fyriskipararnir.

Millum kvinnurnar í Bíbliuni vóru sterkar persónligheitir, sum ikki óttaðust at seta lív sítt í vága, men stríddust fyri tí, sum tær hildu vera rætt.

Nevnast kunnu Ester, sum var tilreiðar at doyggja fyri fólk sítt, og Debora, sum varð sett sum dómari yvir í Ísrael, Lea, sum varð vrakað og skøkjan Rahab, sum er nevnd í ættartalvu Jesusar.

- Hesar og fleiri við teimum hava nakað at læra okkum. Tí er tað okkara ábyrgd at geva, serstakliga kvinnum, innlit í hesar dýrgripir, sum Gud vil læra okkum ígjøgnum skriftirnar, sigur Hjørdis Petersen, sum fer at halda fyrilestur á kvinnudegnum í Kelduni.

Tiltakið verður millum klokkan 10 og 14 og er ókeypis.

## Avgerð um Cambodia í vár

**Heimamissiónin:** - Úti á landinum er stórur tørvur á skúlum. Tey spyrja eisini eftir hjálp at leiða og skipa fyri, sigur missiónsskrivarin hjá Heimamissiónini, Øssur Kjølbro eftir ferðina í Cambodia herfyri. Endamálið var at kanna, hvørt landið kann gerast eitt missiónsøki hjá Heimamissiónini í framtíðini. Hetta er ikki greitt enn, men væntandi fer Høvuðsstýrið at taka avgerð um hetta einaferð í vár.

## Annarhvør konfirmantur trýr uppá Gud

**Fólkakirkjan:** 57 % av donsku konfirmantunum trúgva á Gud, vísir ein fesk kanning millum teir 45.000 ungdómarnar sum skulu fermast í ár. Konfirmatiónin skal játta barnadópin og hervið eisini trúnna á Gud, men kortini trúgva 43 % av næmingunum í 7. flokki ikki á Gud, avdúkar kanningin hjá Center for Ungdomsstudier og Religionspædagogik. Tey flestu siga seg verða fermd vegna festina og gávurnar, ella tí at tað er ein siður. Í miðal fær ein konfirmantur millum 8.000 og 40.000 krónur í gávum.

## Ætlar at hitta rørslurnar



**Fólkakirkjan:** Í nærmastu framtíð fer Jógvan Fríðriksson at boða kirkjuligu rørslunum til ein fund við ynskinum um at betra samskiftið. - Vit ynskja at tosa við tær kirkjuligu rørslurnar um, hvussu vit kunnu minka um frástøðuna og skilja hvønn annan betri, sigur biskupur við Trúboðan.

## 10. hvør prestur í einsemi

**Danmark:** Ein kanning millum tey 123 starvsfólkini í Fríkirkjuni vísir, at tíggjundi hvør prestur kennir til einsemi í tænastuni sum leiðari. Hóast tey flestu eru nøgd, siga kortini bert 2/3 seg vera í einum toymi sum virkar. Kanningin, sum FrikirkeNet hevur gjørt avdúkar eisini at bert helmingurin av kirkjunum hava virksemi, sum vendir sær til tey søkjandi.